## VODAFONEDEILDIN 18. UMFAR:

### FC Suðuroy - B36 2-1 (0-1)

Dómari: Lars Muller

**0-1: Klæmint Matras, 20.**
**1-1: Jón Krosslá Poulsen, 50.**
**2-1: Mamuka Toronjadze, 79.**

**FC Suðuroy:** Stanislav Kuzma – Martin Tausen, Kasper Schultz, Heini Vatnsdal, Heini Bech – Henning Joensen (Arthur Tausen, 81.), Palli Augustinusen, Teitur Tausen, Tóki Brattalíð (Brandur Suðuroy, 69.) – Jón Krosslá Poulsen (Jónar Borg Dahl, 89.), Mamuka Toronjadze
Gult kort: Martin Tausen og Heini Bech
Venjari: Jón Pauli Olsen

**B36:** Meinhardt Joensen – Jónas Tór Næs, Dmitrije Jankovic, Odmar Færø, Símun Joensen (Fróði Clementsen, 86.) – Klæmint Matras, Bárður Olsen, Heini í Skorini (Rúnar í Lon Jacobsen, 85.) – Christian Mouritsen, Stig-Roar Søbstad (Høgni Eysturoy, 56.), Hjalgrím Elttør
Gult kort: Jónas Tór Næs
Venjari: Sigfríður Clementsen




### HB - B68 1-0 (1-0)

Dómari:

**0-1: Tórður Hreiðarsson, 2.**

**HB:** Tórður Thomsen, Tórður Hreiðarsson, Rógvi Holm, Fróði Benjaminsen, Kári Nielsen (46: Rókur av Fløtum Jespersen), Símun Samuelsen, Andrew av Fløtum, Levi Hansen, Hendrik Rubeksen, Rógvi Poulsen (46: Kristin R. Mouritsen) og Vagnur Mohr Mortensen.
Gult Kort: Símun Samuelsen og Kári Nielsen
Venjari: Krintján Guðmundsson

**B68:** Vlada Filipovic, Pól Johannus Justinussen, Jóhan Dávur Højgaard, Øssur Hansen (53: Niclas F. Joensen), Ndende Adama Gueye, Remi Langaard (82: Eli Simonsen), Jóhan Petur Poulsen, Kristian Anton Andreasen (65: Dánjal Pauli Højgaard), Ahmed Keita, Andre Olsen og Ibrahim Camara.
Gult Kort: Øssur Hansen, Ndende og Niclas Joensen
Venjari: Bill M. Jacobsen




### AB - ÍF 1-4 (1-2)

Dómari: Petur Reinert

**1-0 Bartal Eliasen, 35.**
**2-0 Jan Ellingsgaard, 41.**
**1-2 Mortan úr Hørg, 45.**
**1-3 Øssur Dalbúð, 53.**
**1-4 Andy Olsen, 87.**

**AB:** Símun Rógvi Hansen - Mortan úr Hørg, Tehe Aristide, Gunnar Haraldsen, Yohan Borðoy - John Hansen, Kenneth Jacobsen, Evrard Blé(Tróndur Sigurðsson, 46.) - Dion Splidt(Ingvard Vang, 19.), Jákup P. Dam, Nikolaj Eriksen
Gult Kort: Tehe Aristide, John Hansen og Mortan úr Hørg.
Venjari: Sámal Erik Hentze og Allan Mørkøre

**ÍF:** Jákup Mikkelsen - Áki Petersen, Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Høgni Zachariassen(Andy Olsen, 73.) - Karl Løkin(Alexander Jovevic, 76.), Fritleif í Lambanum(Dánjal á Lakjuni, 79.), Frank Poulsen - Nenad Saric, Jan Ellingsgaard, Øssur Dalbúð
Gult Kort: Karl Løkin og Fritleif í Lambanum
Venjari: Ábraham Løkin




### NSÍ - EB/Streymur 0-0

Dómari: Petur Reinert

**NSÍ:** Andras Gango – Jónhard Frederiksberg, Johan Troest Davidsen, Jens Joensen, Einar T. Hansen – Jann Martin Mortensen (Erland B. Danielsen, 61.), Jann Ingi Petersen, Jústinus R. Hansen, Heðin á Lakjuni (Debes Danielsen, 84.) – Klæmint A. Olsen (Bogi Løkin, 28.), Christian Høgni Jacobsen
Gult kort: Jann Martin Mortensen, Bogi Løkin, Jens Joensen
Venjari: Pauli Poulsen

**EB/Streymur:** René Tórgarð – Gert A. Hansen, Egil á Bø, Sorin Anghel (Arnar Dam, 90.), Alex José dos Santos – Gudmundur Nielsen, Brian Olsen, Pauli G. Hansen (Kristoffur Jakobsen, 79.), Hans Pauli Samuelsen – Daniel Udsen – Leif Niclasen (Arnbjørn T. Hansen, 79.)
Gult kort: Leif Niclasen, Sorin Anghel, Egil á Bø
Venjari: Heðin Askham




### Víkingur - B71 5-0 (1-0)

Dómari: Bárður Mortensen

**1-0: Hanus Jacobsen, 8.**
**2-0: Nenad Stankovic, 51.**
**3-0: Páll Klettskarð, 59.**
**4-0: Páll Klettskarð, 61**
**5-0: Finnur Justinussen, 90. br**

**Víkingur:** Geza Turi – Sverri Jacobsen, Erling Jacobsen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen – Bárður Hansen, Sam Jacobsen, Nenad Stankovic, Sølvi Vatnhamar – Finnur Jústinussen, Páll Klettskarð
Venjari: Jógvan Martin Olsen

**B71:** Predrag Markovic – Bojan Zivic, Jóhannis Jensen, Allan Tungá, Tummas Clementsen – Ebbe Kristin Thomsen, Danilo Kovasevic, Marko Stanic, Símin Hansen, Mikkjal Hentze – Tummas Hans Rubbeksen.
Reytt kort: Símin Hansen (tvey gul kort)
Venjari: Piotr Krakowski







*EM liðið frá vinstru: Turid Kjærbo, Rókur í Jákupsstovu, Jón Bjarnason, Pauli Øssurson Mohr og Pál Joensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Vælkomin heim Pál

**SVIMJING** Svimjisambandi hevði í gjár ein móttøku fyri EM-liðnum, sum vann silvurheiðursmerki umframt setti norðurlendsk, føroysk og persónlig met

Tróndur Arge:

Klokkan er 10.30 og fitt av fólki er samla í snotiligu hølinum hjá Baresso, har Jon Hestoy, formaður í svimjisambandinum, bjóðar vælkomin og presenterar EM-liðið.

Fyrst á pallin er Turid Kjærbo, sum umframt at verða fysioterapeut hjá Pál, eisini er mamma Pál. Síðani koma Rókur í Jákupsstovu, næstformaður í svimjusambandinum, Jón Bjarnason, venjari hjá Pál. Eftir teir koma so teir báðir, sum hava framt brøgdini í Budapest í Ungarn, Pauli Øssurson Mohr og Pál Joensen.

**»Tit flyta mørk«**

Stemningurin er lættur millum fólkini á EM-liðnum, sum øll hava eitt smíl á, meðan landsstýriskvinnan í mentmálaráðnum, Helena Dam á Neystabø kemur á pallin at siga nøkur orð. Hon segði millum annað, at avrikini hjá EM-liðnum fóru at flyta mørk og vísti annars á týdningin av úrslitinum hjá Páli og teimum.




*Helena Dam á Neystabø fær handa undirskriftir frá Petur Mohr Reinert*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Hetta er størsta ítróttarbragdið framt av føroyskum ítróttarfólki

HELENA DAM Á NEYSTABØ
LANDSSTÝRISKVINNA Í MENTAMÁLUM

Eftir landsstýriskvinnuna kom ÍSF forsetin, Petur Elias Petersen, á pallin. Hann tosaði millum annað um komandi OL og hvørjar møguleikarnir eru fyri at Pál sleppur at luttaka har. Hann segði millum annað, at teir kanna allar møguleikar og tosa við Danmark um eina loysn eisini.



*SMS bjóðaði snotuliga svimjihylskaku*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Undirskriftir til Helenu**

Síðani fekk EM-liðið handa blómur frá millum annað SMS og so stóð frítt hjá øllum at heilsa uppá Pál, Paula, Jón og hini á EM liðnum. Helena Dam á Neystabø fekk eisini handa eitt skjal við 1200 undirskriftum, sum Facebook bólkurin »50 metra svimjihyl nú« hevur savnað inn. Tað var Petur Mohr Reinert, ið handaði landsstýriskvinnuni í mentamálum undirskriftirnar.

trondur@sosialurin.fo